# 350 fólk á aðalfundi

**Føroya Pedagogfelag hevði leygardagin aðalfund á Hotel Føroyum. Heili 350 limir møttu upp, og er hetta fyri meira enn 30 prosent av limunum, umframt at tað ongantíð áður hevur verið so góð uppmøting á aðalfundi hjá Pedagogfelagnum**

AÐALFUNDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin hevði Føroya Pedagogfelag aðalfund. Bjørghild í Geil og Ann-Elisabeth Joensen stóðu fyri vali, og báðar vóru afturvaldar. Hinar í nevndini eru Carita Björklund, forkvinna, Gitta av Kák og Marita Ejdesgaard.

Aðalfundurin byrjaði við, at Mogens Seider frá Socialpædagogens Landsforbund úr Danmark helt fyrilestur við evninum »Etisk værdigrundlag«.

Heili 350 limir vóru komnir saman til aðalfundin, og er hetta gott og væl 30 prosent av øllum limunum. Og verður upplýst av Pedagogfelagnum, at hetta er tað mesta nakrantíð.

– Hví tað júst komu so nógv fólk hesaferð, dugi eg ikki rættiliga at greiða frá, sigur Carita Björklund, forkvinna í felagnum.

– Fyrilesturin hevur helst drigið fleiri fólk til, og so tað, at vit hava sáttmálasamráðingar í ár hevur helst eisini drigið fleiri til. Eisini bjóðaði felagið náttúrða aftaná, har tað var høvi til at sita og práta, og tað hevur helst eisini havt nakað at siga, metir Carita Björklund.

Carita sigur, at fundurin gekk væl, og tey eru væl nøgd við fundin.

Sáttmálin hjá Pedagogfelagnum gongur annars út tann 1. oktober í ár.



*Heili 350 fólk vóru møtt upp til aðalfundin hjá Føroya Pedagogfelag leygardagin. Hetta er tað mesta nakrantíð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Hugnaløta fyri ættleidd børn

*Ikki frítt, at henda fitta diddan er eitt sindur smæðin. Hon var saman við foreldrunum hjá sær í Pálsstovu leygardagin, har skipað varð fyri tiltakið fyri foreldur at ættleiddum børnum*





*Heili 200 fólk vóru komin saman í Pálsstovu leygardagin. Hesin fitti beiggin var ímillum tey yvir 100 børnini*

**Leygardagin varð skipað fyri einum tiltaki fyri foreldur at ættleiddum børnum í Pálsstovu. Tað var DanAdopt úr Danmark, sum skipaði fyri, og vóru tilsamans yvir tveyhundrað fólk komin saman**

ÆTTLEIÐING
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

DanAdopt úr Danmark skipaði leygardagin fyri einum tiltaki í Pálsstovu í Havn fyri foreldur at ættleiddum børnum, og sluppu børnini sjálvandi eisini at vera við.

Hetta er fyrsta tiltakið av sínum slag í Føroyum. Onkuntíð fyrr hevur verið skipað fyri líknandi tiltaki inni í Eysturoynni, men hesuferð var tað fyri allar Føroyar.

– Allar familjur, sum hava ættleidd børn úr útlondum, kundu vera við. Fyriskipararnir frá DanAdopt fortaldu eitt sindur um tað nýggjasta, og so vóru tveir filmar vístir úr Korea og India fyri teimum, sum høvdu áhuga, sigur Ann Lindberg, sum hevur hjálpt til við tiltakinum.

## Undirhald

Tiltakið byrjaði klokkan 13 leygardagin og helt áfram allan seinnapartin. Foreldrini sluppu at práta saman, meðan børnini fingu vitjan av Angelu og einum ungum gandakalli.

– Ein drekkamunn fingu vit eisini, men tiltakið var fyrst og fremst sosialt. Vit hava ein mammubólk í Havn, men vit vita onki um foreldur at ættleiddum børnum á bygd. Upplýsingar hava vit ikki loyvi at fáa frá Ríkisumboðnum, so lýst varð í bløðunum, so øll tey, ið høvdu hug kundu koma við, greiðir Ann Lindberg frá.

Í Danmark eru slík tiltøk meira ella minni vanlig. Tað verður ofta skipa fyri slíkum, og tað er eisini lokalstøð, sum skipa fyri.

– Hetta var eisini eitt ynski frá foreldrum, sum hava ættleitt. Vit hava ongan møguleika at koma í samband við hvønn annan annars.

Væl varð eisini tikið undir við tiltakinum. Eini 100 vaksin møttu upp, og tilsamans vóru eini 200 fólk í Pálsstovu leygardagin.

– Nøkur ættleidd børn eru nú eisini so mikið vaksin, at tey høvdu teirra egnu børn við, so tað vóru trý ættarlið til staðar, og tað var ógvuliga stuttligt at síggja, sigur Ann Lindberg. Ann Lindberg heldur, at fólk vóru ógvuliga glað fyri tiltakið.

– Vit gjørdu eisini ein lista, sum fólk kundu skriva seg á, so vit kunnu fara at skipa fyri einum ella øðrum einaferð um árið.



*Fyriskipararnir frá DanAdopt í Danmark: Ole Bergmann, Marianne Wung-Sung, Mette Garnæs og Ida Balling*



# Aldargomul vinna skerd rættindi

**- Seinastu árini hevur nógv verið tosað um rættin til fiskiríkidømi. Mær tykir, at opnu bátarnir eru gloymdir í hesum kjakinum, sigur uppilagstur fiskimaður, ið hevur útróður sum ítriv**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*

*Tað er avmarkað, hvussu nógvar fiskidagar ein opin bátur hevur um árið - ikki minst á plássum sum Lambavík, ið er brimpláss. - Vit eiga ikki at vera í bólki saman við deksførum, heldur Sámal Jóhan Gaardlykke, ið er uppilagstur fiskimaður.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Sámal Jóhan Gaardlykke í Lamba, sum plagar at rógva út av Lambavík, tá iá veður er til tess, heldur lítið um, at opnir bátar ikki skulu sleppa til útróðrar, tí at fiskidagarnir hjá hesum bátum eru uppi. Soleiðis var í fjør summar, áðrenn nýggir fiskidagar vórðu útskrivaðir, og soleiðis var eisini nú seinast í farna ári.

Sámal Jóhan er uppilagstur fiskimaður. Hann sigldi alt sítt góða lív, og í fleiri ár átti hann snellubátin, Grunning.

## Uppi tvær ferðir

Tá ið hann legðist uppá land, fór hann undir smáútróður sum ítriv. Hetta er ofta tað, sum einum uppilagstum fiskimanni dámar best. Sámal Jóhan hevur ein minni bát, sum kann dragast oman og niðan á vogni - alt eftir, hvussu líkindini á Lambavík nú einaferð eru.

Hann hevur fiskiloyvi í bólki 5B, og tað er í hesum bólki, at fiskidagarnir vórðu uppi tvær ferðir seinasta ár.

- Tað er ein undarlig kensla, at vit, sum hava hesar smáu bátarnar, ikki skulu sleppa at fiska, samstundis sum tey størru skipini, kunnu fara út á ytru landleiðina og vinna sær fleiri fiskidagar fyri teir, ið roynt verður uttanfyri.

Sámal Jóhan sigur, at hann var 53 dagar á floti í fjør og fiskaði 15 tons.

Søluvirðið var einar 180.000 krónur.

- Eg vil siga, at hetta er eitt brúkiligt dagatal, men tá ið vit eru í bólki við felagskvotu, har eisini bátar eru, sum hava dekk, vita vit ongantíð, hvussu nógvar fiskidagar vit fáa í einum ári. Høvdu vit, sum hava útróðurin til ítriv, einar 50 fiskidagar í part, hevði alt verið í lagi. Men knappliga standa vit har, tí fiskidagarnir eru uppi, og tað er ógvuliga keðiligt.

Hann heldur ikki, at deksfør áttu at verið við í sama bólki sum opnir maskinbátar, tí deksførini kunnu vera á útróðri nógvar dagar, har opnu bátarnir liggja bundnir við bryggju.

- Vit hava snøgt sagt ikki somu fyritreytir, sigur Sámal Jóhan.

## Aldargomul vinna

Sámal Jóhan vísir á, at ein ørgrynna av bátum eru í bólkunum, 5B og 5D, sum fiska av felagskvotu.

- Fóru allir hesir bátar á flot, vóru bert nakrir heilt fáir dagar í part í hvørjum hálvári. Tí vil eg mæla til, at vit, sum reka ein avmarkaðan útróður við opnum bátum og hóast alt hava hetta sum vinnu, fáa nakrar fiskidagar tillutaðar í part.

Sámal Jóhan vísir á, at útróður við opnum báti er tað, sum hevur lívbjargað føroyingum upp ígjøgnum tíðirnar.

- So, skulu vit tosa um søgulig rættindi, sum nógv hevur verið frammi seinastu árini, áttu vit, sum hava hesar bátarnar, ikki at verið fyri slíkum vanbýti. Hetta eru jú so smáar nøgdir, talan er um, men fyri okkum, sum hava siglt alt okkara lív, hevur hesin útróður stóran týdning, sigur Sámal Jóhan Gaardlykke.

# Gott lag umborð á gomlu Ternu

**Øll manningin umborð á gomlu Ternu eru avloysarar og veit sær ongan annan kjans hjá Strandferðsluni, nú teir eru leysir av stovninum í hesi vikuni**

SEINASTA FERÐIN
*Vilmund Jacobsen*



*- At Skálafjarðarleiðin fór at verða niðurløgd, hava vit vita av í longri tíð. Spurningurin hevur bara verið um – nær, og hetta er so seinasti dagurin hjá okkum, siga teir báðir, skipari og stýrimaður.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað var ikki jarðarferðarlag umborð á gomlu Ternu týsdagin fyrrapartin, tá ið vit høvdu skiparan, Róa Jacobsen úr Havn og stýrimannin, Sámal Petur í Grund úr Søldarfirði í telefonini.

- Jú, lagið er øgiliga gott. Vit hava havt rundstykkir í morgun, og seinnapartin verður wienarbreyð og kaffi á skránni. Vit hava vita av hesum leingi, og tí er tað líkasum bara at fáa hetta yvirstaðið.

Soleiðis søgdu bæði skipari og stýrimaður við ein munn, nú hendan seinasta dagin, gamla Terna siglir millum Skálafjørðin og Havnina.

Frá í dag verður eingin sigling, og Strandferðslan hevur víst til bussarnar, sum koyra millum Eysturoynna og Havnina.

## Allir avloysarar

5 mans hava verið við Ternuni, og teir eru allir avloysarar. Allir eru leysir av Strandferðsluni, tá ið hesin mánaðurin er úti í vikuni og sum er, vita teir sær ongan annan kjans hjá Strandferðsluni.

- Eingin av okkum hevur annan kjans í boði, siga skipari og stýrimaður.

Týsmorgunin var ikki endaliga avgjørt, hvar Ternan verður løgd, men sum skilst, verður tað helst í Vestmanna.

- Hetta fáa vit at vita seinni í dag, sigur skiparin. Sámal Petur fór umborð á Ternuna, 3. juli ár 2000. Var í landi, meðan hann sat í landsstýrinum og fór síðan umborð aftur fyrst í juni 2002.

Rói er ungur í garði. Hann byrjaði at loysa av sum stýrimaður við Teistanum um Skopunarfjørð í fjør summar, og hevur síðan siglt í 5 mánaðir sum skipari við Ternuni.

## Sum vanligt

- At Skálafjarðarleiðin fór at verða niðurløgd hava vit vita av í longri tíð. Spurningurin hevur bara verið um – nær, og hetta er so seinasti dagurin hjá okkum, siga teir báðir, skipari og stýrimaður.

Ternan fór úr Havn seinasta túrin í gjár kl. 16.20.

- Vit sigla hendan túrin sum vanligt – fyrst inn á Toftir og síðan yvir á Strendur. Síðan fáa vit at vita, hvar skipið verður lagt, siga Rói Jacobsen og Sámal Petur í Grund.

# Helst nýggj ruta um einar tveir mánaðir

**- Gongst alt væl, vóna vit, at nýggja farleiðin millum Skálafjørðin og Sund kann fara av bakkastokki um einar tveir mánaðir ella so, sigur Sámal Petur í Grund**

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Gongst sum ætlað hjá Sámal Peturi í Grund og hansara fólkum, sum arbeiða við at fáa eina nýggja farleið í lag millum Skálafjørðin og Sund, kunnu vit vænta, at fyrsti túrurin verður sigldur um einar tveir mánaðir ella so.

Sámal Petur sigur, at felagið, Sjótek, hevur verið í Noregi og hugt at ferjuni, sum stigtakararnir ætla at keypa.

- Fyrstu útmeldingarnar hjá Sjótek um ferjuna eru ógvuliga positivar, og vit rokna við, at frágreiðingin fyriliggur seinni í hesi vikuni, sigur Sámal Petur.

Í fjør heyst vóru stigtakararnir í Noregi og hugdu at ferjuni, og nú hevur so Sjótek, ið eru skipakønir, eisini verið har yviri.

- Hetta er ein ávís ferja, sum í løtuni er í drift. Hon siglir millum Norodden og Sørodden, norðanfyri Bergen. Felagið, sum eigur ferjuna, hevur eina aðra, sum liggur tøk, og tí kunnu teir selja hesa, sigur Sámal Petur.

## Um 2 mánaðir

Gongst alt væl, vónar hann, at nýggja farleiðin millum Skálafjørðin og Sund kann fara av bakkastokki um einar tveir mánaðir ella so.

- Men hetta avhongur so eisini av, hvørji krøv Skipasýnið fer at seta, sigur Sámal Petur í Grund.

Ætlaða ferjan tekur fleiri enn 80 vanligar persónbilar – ella 6 trailarar og 50 persónbilar samstundis.